# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 9. oktober 2009


# KÍ stevnir FSF eftir tríkvartari millión

## Grønlendsk landsliðs-vitjan

**Fýra landsdystir standa á skránni hjá føroysku hondbóltskvinnunum komandi dagarnar**


HONDBÓLTUR
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*


Leygardagin 10. oktobur kemur grønlendska kvinnulandsliðið til Føroya og fer næstu dagarnar at leika dystir móti føroyska U19/ U21 kvinnulandsliðnum.

Vitjanin hjá grønlendska kvinnulandsliðunum er liður í fyrireikingum til luttøku í kappingini Pan American Games. Á liðnum eru fleiri leikarar, sum spæla í næstbestu deild í Danmark og talan er tí uttan iva um eitt gott lið.

Grønlendska vitjanin kemur væl við hjá Hondbóltssambandinum, sum seinasta árið hevur skipað fyri landsliðsvenjingum fyri kvinnuunglingar í aldrinum 19 ár og 21 ár. Venjarin hjá kvinnuunglingunum, Claus Rasmussen roknar við, at dystirnir kunnu geva okkara leikarum nakrar royndir og eisini siga okkum eitt sindur um, hvussu okkara støðið er. Kvinnuunglingarnir hava seinastu mánaðirnir verið saman eina ferð um mánaðin til venjingar. Annars hevur føroyska kvinnulandsliðið nakrar spennandi uppgávur fyri framman. Millum annað kemur danska U18 landsliðið við Heine Eriksen sum venjara at vitja í februar, og seinni út á várið er eisini Challenge Trophy á skránni.

Fyrsti av teimum fýra landsdystunum verður í Havn sunnudagin. Mánadagin verður spælt í Klaksvík, týsdagin í Kollafirði og mikudagin verður aftur spælt í høllini á Hálsi í Havn.

**Í Klaksvík halda tey fast um, at flytingin av spæliloyvinum hjá Christiani Restorff Mouritsen, hevði avgerandi týdning í niðurflytingarstríðnum. Stevnt verður tí eftir mettum inntøkumissi, sum stendst av at spæla í 1. deild heldur enn Vodafonedeildini**





Jákup Mørk




KÍ hevur nú fyrireikað kæruna til FIFA. Kravið er, at FSF skal rinda KÍ 100.000 Eurur í endugjaldi fyri inntøkumiss

Hóast tað í alt heyst hevur verið rumbul um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen, sum slapp at flyta úr HB til B36 uttan fyri flytingarvindeygað, so er eingin ivi um, at úrslitini í kappingini standa við. Tað stendur nevnliga í lógunum hjá FSF, at hevur ein spælari fingið spæliloyvið, so er hann at meta sum lógligur. Eisini hóast tað seinni skuldi víst seg, at spæliloyvið varð útskrivað av órøttum.

Í Klaksvík ásanna tey eisini, at niðurflytingin er veruleiki, men tey vilja ikki finna seg í, at KÍ skal vera fyri inntøkumissi av hesum, tí júst flytingin av nógv umrødda spæliloyvinum hevði stóra ávirkan í niðurflytingarstríðnum, verður mett.

- Vit hava alla tíðina sagt, at vit ikki vilja sleppa málinum, og eg kann vátta, at vit í løtuni fyrireika kæru til FIFA, har vit krevja FSF eftir 100.000 eurum, sigur Fríðin Ziskason, nevndarformaður í smápartafelagnum, sum rekur fremsta liðið hjá KÍ.

### Fleiri grundgevingar

Enn er ikki greitt, júst hvørjar lutir kæran frá KÍ snýr seg um. Men tað stendur fast, at tey í Klaksvík eru serstakliga ónøgd um, at Kappingarnevndin vísandi til undantaksreglu na í grein 17.5 í Kappingarreglunum gav undantak til at flyta spæliloyvið.

Í frágreiðingini til regluna verður millum annað sagt, at hendan kann nýtast, tá mistak ella umsitingarlig misskiljing hava elvt til, at umsóknin um flytan av spæliloyvinum ikki er komin rættstundis inn. Men hetta er ein próvbyrða, sum eitt nú Jens Wang, løgfrøðisligur ráðgevi hjá FSF, sigur ikki heldur. Einamest tí eitt forgloymilsi ikki kann roknast sum eitt mistak ella misskiljing.

Hartil eru klaksvíkingar illa nøgdir um, at FSF-forsetin sjálvur var partur av málsviðgerðini, tá avgerðin varð tikin. Í Klaksvík meta tey, at forsetin var inhabilur í hesum, tá beiggi hansara hevur verið umboðsmaður hjá Christiani Restorff Mouritsen.

### Tevez sum fordømi

Verður hugt at líknandi viðurskiftum aðrastaðni, so finst eitt ikki heilt ólíkt fordømi í Onglandi.

Har gjørdist talan um stórt rok, tá West Ham onkursvegna lirkaði Carlos Tevez inn um lógarverkið fyri trimum árum síðani.

Tevez hevði sín avgerandi leiklut í, at West Ham bjargaði tilveruni í Premier League, og tvey ár seinni fekk Sheffield United viðhald í endurgjaldskravi upp á £6.000.000. Hetta var upphæddin, sum Sheffiel United metti seg missa av niðurflytingini – ein niðurflyting, sum felagið helt varð kraftiga ávirkað av styrkinum, sum West Ham fekk í Carlos Tevez.

Um West Ham hevði flutt niður uttan Tevez, er sjálvandi ein hypotetiskur spurningur. Og tað er eisini ein hypotetiskur spurningur, um B36 hevði flutt niður uttan Christian Restorff Mouritsen.

Men prinsippið er, at slíkar flytingar ongan tíð mugu bróta ítróttarliga integritetin í kappingini, og tað er tað, sum KÍ metir er hent í hesum førinum.